## Á pallinum í Klaksvík

| | | | |
|---|---|---|---|
| Shu-bi-dua | David Phelps | Anytime | Poppkorn |
| The Rasmus | Martin Joensen | Vísumenn | Angela & Hannibal |
| Roger Hodgson | Maggie Reilly | Peter Thorup Trio | Trøllapætur og omman |
| Kim Hansen | F.R. David | All That Rain | Silvi |
| Páll Finnur Páll | Anfinn Nielsen | Crawling Blue | Festival-djórini |
| Høgni Lisberg | Eyðun & Terji | Budam | |
| Johnny Deluxe | Sámal og Jóan Jakku | The Story Ends | |
| Sarah Brendel | Hanus G. Johansen | Káta Hornið | |





*Einasti luttakarin, sum triða árið á rað stendur á pallinum, er Hanus G. Johansen. Men ein fólkasangari av slíkum kalibri er mest sum eitt must til eitt somikið fólksligt tiltak*



*Vágsbøur er tómur, nú Erik og restin av fyrireikarunum pussa seinastu elementini til*

Mannamúgvan var enn størri, og tey allar flestu høvdu bara latið seg í eftir umstøðunum. Og sum heild haldi eg, at føroyingar hava lært seg at góðtaka eitt sindur av hvørjum, tá um veðrið ræður.

Men hvussu við útlendsku nøvnunum. Hvat siga tey til at spæla í slíkum veðri.

– Tað víst seg so als ikki at bila. Ættin var tíbetur í bakið á pallinum, so tey merktu lítið og einki sjálvi. Og tað er kanska eisini ein øðrvísi uppliving hjá teimum, at oysandi regn ikki koppar nøkrum sum helst.

Og besta dømi um sannleikan í hesi útsøgn, mundu vit fáa í fjør, tá Anne Linnet var á pallinum.

Hetta var júst um tað mundið, tá regnið var av tí allarmesta: »I er dog fantastiske. Det pisser ned, og i er skideligeglade« ljóðaði kontana meldingin frá donsku songkvinnuni, áðrenn hon aftur leitaði í mest sum ótømandi goymsluna av væl kendum hittum.

### Ber eisini til uttan klaksvíksbólkar

Onkra tíð hevur verið skotið fyrireikarunum fyri, at talan fyri nógva er um avdankaðar klaksvíkarbólkar, sum sleppa framat á festivalinum, men hesum er Erik als ikki samdur í. Og hann leggur afturat, at hóast gomlu bólkarnir avgjørt hava givið sítt íkast, so eru teir ikki sjálvt fundamentið undir festivalinum.

– Men tað hongur væl eisini saman við konseptinum hjá okkum. Sum eg havi sagt, so var kjarnin hjá bólkum sum Straight Ahead, Science Fiction, Frændum, Dynamitt og øðrum, at talan er um sannbæran og savnandi tónleik. Skulu vit hava slíkan tónleik fyri teimum, sum eru farin um tey 35 – og kanska meira – so mugu vit væl leita aftureftir. Og tað vildi verið løgið, um vit ikki hugdu eftir teimum nøvnum, sum vit hava her.

– Tað er tó mark fyri, hvussu nógvar slíkar bólkar tú finnur her norðuri, og tað nostalgiska hvørvur eisini, um teir eru á pallinum hvørt ár. Í ár hava vit tó fingið Anfinn á pall, og hann dugir vanliga at seta lív í. Og við Hanus G. Johansen hava vit einasta navnið, sum hevur verið á hinum báðum festivalunum – og eisini hann eru vit sera fegnir um.

– Men vit meta tó ikki, at hesir bólkarnir eru fortreytin fyri festivalinum. Sjálvandi fara føroyskir bólkar altíð at vera við til at mynda ein slíkan festival, men vitt hava eisini sæð, at útlendsku nøvnini verða bæði fleiri og størri. Í ár er tað soleiðis bert Kim Hansen av føroysku solistunum, sum spælir á stóra pallinum. Og tað sigur nakað um, hvussu nógv tiltakið er vaksið, sigur Erik.

Og so kundu vit kanska lagt afturat, at gaman í er festivalurin størri. Men fólksligur er hann framvegis. Nakað sum 8.000 fólk á Vágsbøi í fjør væl og virðiliga kundu skriva undir uppá!

## Fyrsti tunnils-festivalurin

Tað eru mong, sum eru spent um, hvussu nýggi tunnilin fer at ávirka Summarfestivalin. Ikki minst, um lættari atkoman fer at bera fleiri gestir við sær, ella um hetta kann kosta á tann hátt, at fólk bara pendla aftur og fram, heldur enn at taka allan festivalin í einum.

– Tað vita vit jú ikki. Og sum so kann tað venda báðar vegir. Vit vóna sjálvandi, at betraða sambandið dregur enn fleiri fólk, og at hesi framhaldandi síggja tiltakið sum eitt heilt vikuskiftið, heldur enn bara eina lítla útferð til Klaksvík.

– Men á einum øki er talan í øllum førum um fyrimun. Hjá okkum sum fyrireikarunum er óvissan um flutning og annað í øllum førum vorðin minni, so longu nú kunnu vit sláa fast, at tunnilin eisini hevur hjálpt festivalinum, sigur Erik.

**-mørk**

## Ansni ansar tjaldplássinum

Ein partur av festivalinum er tjaldingarøkið úti við Grøv, sum undanfarnu árini hevur verið stúgvandi fult av festivalgestunum.

Tað vóna fyrireikararnir eisini verður galdandi í ár, og eins og í fjør ætla tey, at skilið á økinum skal vera gott.

Vit hava gjørt avtalu við Ansni, sum alla tíðina hevur vakt á økinum. Bæði so vit á tann kunnu tryggja, at skilið á økinum er hampuliga gott. Men eisini fyri trygdina, soleiðis at um okkurt skuldi borist á, eru fólk altíð til staðar at taka sær av hesum. Ella at biða um hjálp, um hetta verður neyðugt.

**-mørk**

## MVG afturat prísinum

Eins og fleiri onnur líknandi tiltøk, so hevur Summarfestivalurin í ár verið noyddur at hækka atgongumerkjaprísin nakað, fyri at fáa endarnar at røkka saman. Men talan hevur hinvegin ikki verið um so stóran prísvøkstur, sum vit hava sæð aðrastaðni.

Soleiðis vórðu fyrstu atgongumerkini seld fyri sama prís, sum í fjør – tó við mvg omaná, og tann príslegan hevur verið galdandi allan vegin.

– Hetta hevur eisini verið rættiliga tilvitað. Vit royna jú eisini at skapa nakað fyri alla familjuna, og tá kann vøksturin verða ógvusligur, um hvørt atgongumerki dýrkar fleiri hundrað krónur, sigur Erik Biskopstø.

**-mørk**